

## Lærarastørv í Skúlanum á Velbastað

Søkt verður eftir tveimum lærarum í fast starv og einum lærara í tíðaravmarkað starv (endaliga tímatalið verður ikki greitt fyrr enn 1. sep.) skúlárið 2008/2009.

**Tey, ið sett verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- vera fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru á skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan
- kunna undirvísa fleirflokkað og næmingatillagað

**Førleikakrøv:**
Tey, ið settur verða, skulu hava læraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambart sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 20. juni kl. 16.00**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Manbjørn Mortensen, skúlaleiðara á tlf. 302505 ella 228607

*Skúlin á Velbastað er ein 4 flokkaður skúli við undirvísing í 1. – 7. árgang. Komandi skúlaár verða 5 lærarar og 54 næmingar á skúlanum*

**Tórshavnar kommuna**

## Bátur til sølu



Grandezza 28 árg. 1981
Stødd: 8,47 x 2,92 x 0,47 m.
Motorur Volvo Penta Kad 43 230 HK árg. 2001, 1900 tímar
Drev Volvo Penta 290 DP
Báturin hevur VHF, ekkolod, farteldu til sjókort. Hitaapparat fra motorinum. WC og trýstvatn. Galla við 3 gassblussum, vaski v.m.
4 koyggjupláss.
Stýring og manøvrering bæði úti og inni.
Ferð upp til 30 míl.

Aðrar myndir av bátinum kunnu síggjast á heimasíðuni: http://heima.olivant.fo/~debes

**Prísuppskot: kr. 420.000**

**Tlf. 211192 ella 220140**

TVØROYRAR KOMMUNA

## Størv til Dagstovnin Mýrifípan í Trongisvági

Vit søkja eftir **3 pedagogum** og einum **fysio-** ella **ergoterapeuti** til stuðulstoymið.

Tveir pedagogar fara í farloyvi ávíkavíst ½ og 1 ár.

Tímatalið kann verða frá 20 til 40 tímar um vikuna.

Størvini verða sett 04.08. 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Arbeiðssetningurin hjá Stuðulstoyminum er:**
- At stuðla og stimbra børnum við serligum tørvi; primert teimum við tilknýti til Mýrifípuna/Sóljuna
- Vegleiða og ráðgeva um børn við serligum tørvi
- Arbeiða fyribyrgjandi
- Geva fakliga vegleiðing til starvsfólk og foreldur

Vit kunna bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv, har tú arbeiðir sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við onnur. Tú hevur eisini møguleika at koma á viðkomandi skeið.

**Vit vænta av tær, at tú:**
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur góð samstarvsevnir; skalt samstarva við foreldur, starvsfólk og aðrar fakbólkar
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfólkum
- At tú ert lagalig/ur, vísir gleði og áhuga í starvinum
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum

**Stovnslýsing:**
Mýrifípan er ein dagstovnur hjá Tvøroyrar Kommunu. Her ganga 75 sera fitt børn í aldrinum 0 til 7 ár , og 20 dugnalig starvsfólk. Stovnurin er skipaður í 4 eindir, 1 vøggustova, 2 barnagarðsstovur og ein útibarnagarðsstova/ Sóljan til tey elstu børnini.

Í stuðulstoyminum arbeiða í løtuni 2 pedagogar 30 og 35 tímar.

Vit samstarva við Sosialu Deild í Tvøroyrar Kommunu og samstarvskommunurnar, og við aðrar fakbólkar, so sum serráðgeva, heilsufrøðing og talulærara.

Stuðulstoymið er ein eind fyri seg, ið fyrst og fremst tekur sær av børnum við serligum tørvi, harnæst er ráðgevandi og vegleiðandi fyri foreldur og starvsfólk.

**Lønarviðurskiftir:**
Løn sambart sáttmálað millum Føroya Pedagogfelag og Kommunufelagið.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Guðruna Petersen, leiðara tlf.372700

**Umsókn:**
Umsókn, saman við prógvið og viðmælum skulu verða Dagstovninum Mýrifípuni, Smærugøta 8, FO – 826 Trongisvágur, innan 20.juni 2008

**Tvøroyrar kommunu**
800 Tvøroyri

# Bilur til Sølu

Nissan Almera 2,2 Diesel
frá januar 2002
koyrt 250.000 km.



Ring 284444

EYSTURSKÚLIN TÓRSHAVN

## Lærarastørv í Eysturskúlanum

Eysturskúlin søkir eftir 7 lærarum skúlaárið 2008/09 at byrja **1. august 2008**
- 2 lærarum í sáttmálasett starv
- 3 lærarum í sáttmálasett tíðaravmarkað starv fyri lærarar í farloyvi
- 1 lærara, fyri lærarar við niðursettari tíð
- 1 lærara til avlopstímar

Skúlanum tørvar bæði lærarar, sum kunnu undirvísa í innskúlingini, miðdeildini og lærarar til framhaldsdeildina.
Í innskúlingini er brúk fyri lærarum at undirvísa í lesing, støddfrøði, handverk/list og ítrótti.
Í miðdeildini er brúk fyri lærarum at undirvísa í føroyskum, donskum, støddfrøði, handverk/list og ítrótti.
Í framhaldsdeildini er brúk fyri lærarum at undirvísa í støddfrøði og alis/evnafrøði

Størvini eru lønt í lønarflokkunum 18.1 –27.4 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið

**Í Eysturskúlanum leggja vit dent á:**
- Í undirvísingini at taka støði í teimum mongu førleikunum
- At leita eftir sterkum síðum hjá næminginum
- At tollyndi skal verða grundleggjandi fyri alt okkara virksemi

**Søkt verður eftir lærarum sum:**
- hava læraraútbúgving
- duga væl at samstarva og samskifta
- áhaldandi vilja menna seg sjálvan og skúlan
- ikki ræðast nýggjar avbjóðingar
- seta tollyndi í hásætið

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 20. juni**

Meira fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við skúlastjóran, Eyðdis Eidesgaard á tlf. 302540 ella 214752

**Eysturskúlin**
Tórgarðsgøta 17
100 Tórshavn

Í Eysturskúlanum verða komandi skúlaár 500 næmingar í 1. til 10. flokki og uml. 45 lærarar. Skúlin er skipaður í sjálvstøðug toymi. Meginreglan er, at lærarar arbeiða í einum toymi burturav. Í hvørjum toymi eru 4-5 flokkar.

STUÐULSSTOVNURIN
The Faroese Student Grant Fund

**Mikudagin 11. og hósdagin 12. juni er stongt vegna Norðurlendskaráðstevnu.**

**STUÐULSSTOVNURIN**
Hoyvíksvegur 72 · Postsmoga 3279 · FO - 110 Tórshavn
tlf. 356800 · telefax 356801 · t-postur: studul@studul.fo - www.studul.fo